**Fylgiskjal 1**

## Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | § 1<br><br>Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 70 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar: |
| 3. stk. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvussu og nær persónar og arbeiðsgevarar skulu rinda tey í stk. 1 nevndu gjøld og av hvørjum A-inntøkum persónar møguliga sleppa undan at rinda gjaldið. | **1.** § 2, stk. 3 verður orðað soleiðis:<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um,<br>1) hvussu og nær persónar og arbeiðsgevarar skulu rinda tey í stk. 1 nevndu gjøld<br>2) av hvørjum A-inntøkum persónar møguliga sleppa undan at rinda gjaldið, og<br>3) um avgreiðslugjald fyri teir arbeiðsgevarar, sum ynskja at rinda tey í stk. 1 nevndu gjøld eftir rokning."<br><br>**2.** Í 2, stk. 5 verður aftaná 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:<br>"TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum. TAKS er eisini heimilað at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu sambært reglunum um hetta í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt."<br><br>**3.** § 2, stk. 7 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 7.* Fyri persónar, fevndir av Nordisk Konvention om Social Sikring, fylgir gjaldsskyldan til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og møguleikin fyri at vera frítikin fyri at rinda í grunnin, teimum vanligu reglunum." |
| 2. stk. [1]Persónur, sum lýkur krøvini í stk. 1, hevur rætt til 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirløn fyri hvørt árið, tó í mesta lagi 40 ár, hann hevur havt fastan | **4.** § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Persónur, |

| | |
|---|---|
| bústað í Føroyum og verið skrásettur í fólkayvirlitinurn í Føroyum, meðan hann var millum 15 og 67 ára gamal. | **1)** sum býr í Føroyum og sum hevur búð í Føroyum í minst 3 ár, meðan viðkomandi var millum 15 og 67 ár, men sum antin er frítikin eftir § 2, stk. 7 ella ikki lýkur krøvini í stk. 1, hevur rætt til 1/15 av fullari arbeiðsmaknaðareftirløn fyri hvørt ár, viðkomandi hevur verið búsitandi í Føroyum, tó í mesta lagi 15/15. Ár við frítøku eftir § 2, stk. 7 telja ikki við.<br>**2)** sum ikki býr í Føroyum, men sum hevur búð í Føroyum í minst trý ár, meðan viðkomandi var millum 15 og 67 ár, hevur rætt til 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirøn fyri hvørt ár, viðkomandi búði í Føroyum, tó í mesta lagi 40/40. Ár við frítøku eftir § 2, stk. 7 telja ikki við." |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019. |